# Vónbrotin vágafólk

**Lagið er øgiliga ringt í Vágum, eftir at leiðslan í Vágatunlinum kunngjørdi prísin, sum gjaldast skal fyri at koyra undir Vestmannasundi**

BUMMTÚRUR
*Edvard Joensen*



*Vágafólk hava stóran áhuga fyri tunlinum, og eru sera vónsvikin av tí, sum nú er hent. Allar vónirnar tykjast nú brostnar hjá fleiri*
*Tilvildarlig mynd*

Vágar: Vágafólk eru sum í øðrum heimi eftir fráboðanina um prísir hjá Vágatunlinum. Summi tosa um uppreistur, og onnur um krígsstøðu. Øll eru samd um, at prísurin má lækkast munandi, um nakar skal brúka tunnilin yvirhøvur.

Tað var ein undarlig kensla millum fólk í Vágum hósdagin. Um middagsleitið komu boðini um prísirnar undir Vestmannasundi, og beinanveg var oyggin á gosi. Fólk vóru skelkað. Summi mótfallin. Og so vóru tað hini, sum østu seg upp og skuldu fylla grót í aftur tunnilin beinanveg.

Eitt uppskot var beinanveg, at nú máttu vágafólk bara taka seg saman og í felag keypa Ternuna at hava siglandi um Sundið. Tað fór at vera bíligari enn at brúka tunnilin. So kundi hann liggja sum eitt skensil til onga nyttu.

Og umborð á Ternuni høvdu pendlararnir fríggjamorgunin eisini tann tankan frammi, at fáa Ternuna at sigla um Sundið. So kundu fólk fara við ferjuni av Oyrargjógv um morgunin fyri gamlan prís og koyra vestur aftur fyri einki um kvøldið, tí kravt verður bara annan veg, um koyrast skal gjøgnum tunnilin. Svart skemt sjálvandi.

Meira álvara er í fólki, ið regluliga ferðast um Vestmannasund, tá komið verður inn á prísin fyri avsláttarkortini.

Enn er eingin, sum veit, hvat mánaðarkortið fer at kosta, men frammi hevur verið, at tað fer at dýrka nakað í mun til tær 1.050,- krónurnar, sum kortið í dag kostar. Tá er talan um bæði buss- og ferjukort úr Vágum til Havnar.

Tosið gongur so um, hvussu dýrt tað veðrur at fara við bili undir Sundinum. Onkur er kortini, sum roynir at vísa á, at tað hóast alt verður bíligari at fara undir Sundinum við fullum bili, enn tað er, nú hvør skal gjalda sær við ferjuni.

Tað kann so gera tað sama, føra onnur fram, tí teir túrarnir, fólk líkasum høvdu lagt sær til rættis at gera til ymisk tiltøk, sum eru á meginøkinum, men sjálvdan uttanfyri, teir fara nú fyri einki.

Eitt nú hava vágafólk tosað um, at nú ber til at fara til Havnar við børnunum at svimja. Kanska ein biograftúrur kann gerast eisini og eitthvørt annað, sum vera kann eitt vikuskifti. Tað slepst jú vestur aftur beinanveg.

Nógv ymsik mentanartiltøk eru í Havn, sum vanliga liggja um kvøldið. Ofta so seint, at skal vágafólk fáa nyttu av teimum, má liggjast nátt í Havn. So verður ikki farið, og tey upplivilsini fara framvið. Við tunlinum hevði tað eisini borið til at rokkið hesum.

Men alt hetta sígjga fólk nú bara sum bláan royk har úti í sjónarringinum einastaðni, siga vágafólk, Sosialurin hitti hósdagin. Tað er ikki hugsandi um at fara slíkar túrar við egnum bili. Tað er ov dýrt.

Heldur ikki um koyrt verður upp á avsláttarkort, letur tað seg gera, eru tað heilt nógv, sum vísa á. Tí lítið sannlíkt er, at fólk yvirhøvur hava 3.000,- krónur til avlops at keypa bilkort fyri, tá alt annað er goldið, verður ført fram.

Tann stóra hátíðin, sum verða skuldi í Vágum, nú fast samband fæst við meginøkið, er fyribils endað sum eitt antiklimaks.

# Latið samferðsluna vera almenna

**Borgarstjórin i Sørvági hevur einki álit á, at samferðslan skal latast privatpersónum ella feløgum at umsita. Hann metir Vágatunnilin vera dømi um, at tað riggar ikki**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*



*Eivin Jacobsen heldur Vágar fara so langt frá meginøkinum við teimum prísum, Vágatunnilin krevur, at hann ætlar at melda seg upp í Útoyggjafelagið*

Vágar: Tað er eingin ivi um, at samferðslan skal vera almenn, sum hon hevur verið, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági. Hann metir Vágatunnilin sum dømi um, at tað nyttar ikki at leggja hana út til onnur at umsita.

–Tað er í mínari verð eingin ivi um, at tað almenna klárar nógv best at røkja samferðsluna hjá okkum, sigur Eivin Jacobsen. Tá fáa vit eina tænastu, sum øll hava ráð at brúka. Tað kann so ikki sigast um tað, sum nú er hent, sigur hann og vísir til prísleguna fyri koyring undir Vestmannasundi.

Eivin Jacobsen metir prísirnar hjá Vágatunlinum so ræðandi, at teir fara at flyta Vágar aftur í tíðina heldur enn at menna oynna, sum ætlanin annars var við tunlinum.

–Eg fari at melda meg upp í Útoyggjafelagið, sigur Eivin Jacobsen, tí so langt burtur frá meginøkinum koma vit nú at vera. Tað verða ikki vanlig fólk, sum kunnu ferðast undir Vestmannasundi fyri teir prísir, sum nú eru ásettir, sigur hann.

Hann vísir á, at bara hósdagin fekk hann sum borgarstjóri í Sørvági fleiri uppringinar frá fólki, sum líkasum vóru komin í neyð av støðuni. Fólk, sum høvdu ætlað sær at flutt vestur í Vágar, tí ferðamøguleikarnir til miðstaðarøkið nú gjørdust so mikið góðir. Men verður prísleggan tann, at tú í minsta lagi skalt leggja 3.000,- krónur á borðið hvønn mánaða fyri at ferðast undir Sundinum, verður tað líka dýrt at búgva í Vágum, sum at búgva í Havn við húsaprísunum har. Og so er einki vunnið, tí í Havn hevur tú øll tilboðini fyri sama prís.

Og Eivin Jacobsen er ikki einsamallur við teirri fatanini, tí eisini borgarstjórar aðrastaðni í Vágum høvdu verið fyri tí sama hósdagin, at fólk ringdu og kærdu sína neyð. Summi høvdu beinleiðis hug at angra, at tey vóru farin undir at byggja í Vágum.

# Alt verður tikið aftur í prísi

**Virkisleiðarin á Føroya Fiskavirking í Miðvági er skelkaður av príspolitikkinum hjá Vágatunlinum. Alt, sum vunnið verður í tíð, verður tikið aftur í prísi, sigur hann**

TUNNILSPRÍSIR
*Edvard Joensen*

Vágar: Alt, sum vit skuldu vinna í tíð, lata vit nú útaftur í prísi fyri at koyra gjøgnum tunnilin, sigur virkisleiðarin á Føroya Fiskavirking í Miðvági, Albert Ellefsen.

Ein av heilt stóru fyrimununum við Vágatunlinum skuldi vinnan í Vágum fáa. Nevniliga at tað skuldi bera betri til at leggja flutningin til rættis. Bæði rávøru í oynna og ikki minst lidna vøru útaftur. Serliga fiskavirkini hava stóran tørv á hesum. Ikki minst tá avskipað verður, tí nú fer mestsum alt umborð í Havn.

Tað hevur kostað nógv at hava havt stóru bilarnar bíðandi bæði á Oyrargjógv og í Vestmanna. Men tí skuldi sloppist undan nú. Tað kundi so merkt, at eitt nú Fiskavirking kundi arbeitt ein ella tveir tímar longri avskipingardagin.

–Men tað kann so mestsum gera tað sama, um vit hugsa um kostnað, sgiur Albert Ellefsen, virkisleiðari á Føroya Fiskavirking í Miðvági. Tað, vit vinna í tíð - og tað gera vit hóast alt - tað fer alt út aftur í hægri kostnaði fyri at koyra undir Sundinum.

Albert Ellefsen sigur, at hann beinleiðis er skelkaður av prísunum. Tað verður øgiliga tungt hjá fyritøkum, sum flyta nógv, at skula gjalda í minsta lagi 2.100,- krónur, hvørja ferð ein bingjubilur skal undir Vestmannasundi, sigur hann.

*–Alt, sum vunnið verður í tíð við at sleppa frá ferjukøini, fer út aftur í ferðaseðlakostnaði, sigur Albert Elelfsen, virkisleiðari á Føroya Fiskavirking í Miðvági, nú prísirnir hjá Vágatunlinum eru kunngjørdir*
*Mynd: Edvard Joensen*





# Arbeiða fyri at broyta prísin

**Á fundi í Vágum hóskvøldið var breið semja um, at arbeiðast skal fyri at lækka ferðaseðlaprísirnar hjá Vágatunlinum**

TUNNILSPRÍSIR
*Edvard Joensen*



*Á felagsfundi á Hotel Vágum, løgdu Fólkafloksmenninir í oynni fram uppskot um, at Landsverkfrøðingurin yvirtekur raksturin av Vágatunlinum, og partafelagið so bara hevur innkrevjingina av lánum at standa fyri. Tað fer at lækka ferðaseðlaprísin við eini helvt, hildu teir.*

Vágar: Vinna og politikarar í Vágum leggja alla orku í at fáa broytt prísirnar hjá Vágatunlinum. Teir eiga at lækka nakað væl, var niðurstøðan á fundi, sum hildin var á Hotel Vágum hóskvøldið.

Løgtings- og landsstýrismenninir í Vagum eru samdir um, at roynt eigur at vera at fáa raksturin av Vágatunlinum lagdan undir Landsverkfrøðingin. Tað sleppir partafelagnum Vágatunlinum beinanveg fundan einum sjey milliónum árliga, sum ger heilt stóran mun í ferðaseðlagjaldinum, førdi Jóannes Nielsen, løgtingsmaður, fram á fundi, sum Felagskommunan og Vinnufelagið í Vágum skipaðu fyri á Hotel Vágum hóskvøldið.

Um støðan verður verandi, sum nú er, væntaðu teir stutt og greitt ikki, at tunnilin fer at verða brúktur, sum ætlanin var. Tað verður einki minni enn ein skandala, um eitt annars so væleydnað tiltak fer at standa ónýtt, tí eingin hevur ráð at koyra, var fundurin samdur um.

### Avsláttarkortini

Sum vera man vóru nógv mál uppi og vendu hetta kvøldið. Eitt var teir avsláttir, partafelagið Vágatunnilin letur ymsu bólkunum.

Men fólk vóru sum heild á einum máli um, at tað fór ikki at verða tikið av hesum tilboðunum, tí hóast tey í longdini eru væl bíligari enn at gjalda fyri hvønn túr sær, eru tey soleiðsi háttað, at tey eru ov dýr at fáa til vega.

Tað var serliga vinnuligu koyringina, tosað varð um á fundinum. Og ein teirra, sum hevur bæði lastbilar og bussar í Vágum, Niels Olgar Joensen á Giljanesi, vísti á, at fyri eitt nú bussranar er bara at gloyma alt um at geva nøkur tilboð, sum hava við ferðavinnu at gera. Tað vil siga tey fólkini, sum koma við skipi til Føroya. Tí prísirnir eru so mikið høgir,at eingin fer at koma vestur i Vágar, sum tað nú sær út.

Sama er hjá lastbilunum, sum skulu um Sundið. Teir hava ongan møguleika at bjóða upp á arbeiði hinumegin, tí aðrir sleppa undan tunnilsgjaldinum, sum nú er voðrið øgiligt.

Avsláttarkortini verða latin ávísum bilum. Tað vil siga, at tey eru markað við nummarplátuni hjá tí ávísa bilinum ella bussinum, og tí ber ikki til at flyta ímillum og keypa til dømis eitt kort, sum tann ávísi bilurin, sum fer um Sundið, so hevur við sær.

–Tað merkir, at í mínum føri skal eg kanska hava eini fimm slík kort.Tey kosta umleið 20.000,- krónur stykkið. Og 100.000,- krónur eru øgiliga nógvir pengar at binda soleiðis uttan rentur, segði Niels Olgar Joensen.

Tó verður tað ikki bara vinnuna hetta fer at raka, varð víst á. Eisini ítróttarfeløgini í oynni fara at koma í neyð av hesum.

Sum er hava feløgini 10 túra kort, sum flutt verða millum ymsar bilar, alt eftir, hvør nú fer við børnunum inn á Skála ella til Havnar at spæla hondbólt.

Tá avsláttarkoritni verða markað, verða tað somu tveir, tríggir bilarnir, sum noyðast at koyra hvørja fer, varð víst á. Og tað fer eingin at tíma, varð niðurstøðan.

### Trýst

Ført varð fram, at frægasta, sum var at gera, var at lata øll ymisk feløg og áhugabólkar senda eina rúgvu av mótmælum bæði til politikarar og Vágatunnilin í teirri vón, at tað fer at vísa teimum á, hvussu tvørligt hetta verður.

Eitt nú varð ført fram, at tey politisku feløgini í vágum hvørt í sínum lagi eiga at ávirka sína flokkar til at mótmæla prísunum. Í øllum førum feløgini í Vágum eru samd á hesum økið, var hildið.

Víst varð á, at sambært løgtingslóg er álagt Strandfaraskipum Landsins at røkja sigling um Vestmannasund.

Tað er eitt uppskot um avtøku av hesi lóg ávegis í tingið. Verður tað felt, skal Strandferðslan framvegis sigla um Vestmannasund.

Onkur hevði tann tanka frammi, at um andstøðan saman við einum samgongulimi atkvøddi í móti at taka siglingina av, varð hon framvegis í gildi. Og so kundu fók ferðast fyri gamlan prís úr Vágum, og koma vestur aftur gjøgnum tunnilin, tí har verður einki nýtslugjald tikið Streymoyarmegin.

Ómoralskt. Ja. Og provokerandi. Men kanska tað hevði fingið onkrar klokkur at ringt onkustaðni.

Eingin ivi tóktist vera á fundinum um, at um prísurin var settur niður í helvt, høvdu í minsta lagið dupult so nógvir bilar sum teir 350, sum mett verður nú, ferðast um Sundið. Og so gongur roknistykkið upp kortini, men fólk gjalda bara helvtina, og øll eru glað.

Tí heilt greitt varð gjørt, at eingin i Vágum ynskir at sleppa heilt undan nýtslugjaldinum. Ikki fyrr enn lánini eru afturgoldin. Men so skal afturfyri vera fritt, var fundurin samdur um.

Vágar 14. november 2002:

## Fundarsamtykt frá felagsfundi í Vágum

Á fundi hóskvøldið14. november 2002, har umboð fyri allar kommunur í oynni saman við vinnufólki í Vágum viðgjørdu teir prísir, kunngjørdir eru í samband við ferðslu undir Vestmannasundi, varð hendan niðurstøða gjørd:

Fundurin heitir á løgting og landsstýri um at arbeiða fyri, at raksturin verður fluttur frá partafelagnum Vágatunlinum og lagdur undir Landsverkfrøðingin. Fundurin metir, at hendan broyting lættir afturgjaldið so munandi, at prísurin kann lækka við umleiðeini helvt.

Fundurin heitir á leiðsluna fyri Vágatunlinum í eini royndartíð at seta ferðaseðlaprísin so lágan, at ein verulig mynd av samlaðu ferðsluni fæst. Mett verður, at við ásettu prísum verður ferðslan so lítil, at bilatalið verður misvísandi.

Fundurin undrast á, hvussu komið er til talið 350 bilar um samdøgurið, sum leiðslan fyri Vágatunlinum hevur ásett. Mett verður ikki, at grundarlagið, brúkt er, er eftirfarandi.

Fundurin ásannar, at vágafólk eru samd um at vera við til at gjalda restlánið, men halda fast við, at eftir at lánið er niðurgoldið, skal nýtslugjaldið takast av.

v/ Felagskommununa í Vágum
Jónhild Jørgensen

v/Vága Vinnufelag
Heðin Poulsen

# Ov tíðliga at gera viðmerkingar

**Tað er ov tíðliga enn at gera viðmerkignar til tey uppskot, sum komin eru um alternativar tunnilsprísir, sigur stjórin í partafelagnum Vágatunlinum**

TUNNILSPRÍSIR
*Edvard Joensen*

Vágar: Tað er ov tíðliga at gera nakrar viðmerkingar til eitt nú uppskotið um at leggja raksturin undir Landsverkfrøðingin, tí vit hava ikki viðgjørt tað enn, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri fyri Vágatunlinum.

Hann veit tó ikki rættiliga, hvat politikararnir í Vágum meina við raksturin. Um tað er sjálvan tunnilin, teir meina við, ella um talan eisini verður um at leggja innkrevjingina undir Landsverkfrøðingin. Tað verður ein politisk avgerð, um nakað skal broytast, sigur hann.

–Vit hava eina annleggslóg at arbeiða eftir,og hon áleggur okkum at fáa inn aftur tað, sum brúkt er at gera tunnilin fyri. Tað royna vit so nú. Verður lógin broytt, soleiðis at vit bara skulu taka okkum av láninum, meðan onkur annar skal rinda raksturin, fara vit at arbeiða eftir tí, sigur Dávur Reinert Hansen.

Bilatalið 350 um samdøgurið er komið fram við eini spurnarkanning, sum gjørd varð umborð á Sam í 1999 sigur Dávur Reinert Hansen. Tá varð eisini spurt um ferðingamynstur og hvat fólk vóru sinnað at gjalda. Út frá millum øðrum tí hava vit ásett prísin, sigur hann.

Heldur ikki á Strandferðsluni vita tey við vissu, hvussu prísirnir fara at ávirka rutur og mánaðarkort.

Strrandferðslan fekk sum øll onnur prísin at vita hósdagin, og nú verður roknað og vent fyri at siggja, hvussu hetta fæst at passa inn í ferðaætlan og príspolitikk á stovninum.